BLAH
Blah
blah

SKRIVAÐ HEVUR UNI LEITISSTEIN HANSEN
MYNDIR: ATLANTIC RECORDS

Føroyska TikTok-fyribrigið Reiley stendur á gáttini til altjóða tónleikagjøgnumbrotið

Rani Petersen úr Havn hevur 10 milliónir fylgjarar á TikTok og plátusáttmála við heimskenda plátufelagið Atlantic Records, og nú stendur Rani á gáttini til stóra altjóða gjøgnumbrotið sum sítt annað ego, poppstjørnan Reiley. Men ferðin móti altjóða popptindunum byrjaði í dreingjakamarinum í barndómsheiminum í Havn

Tað er ilt at fáa eyga á Reiley, tá ið Rani Petersen tekur ímóti í kjallaranum í barndómsheiminum á Traðarvegi í Havn.

Í joggingbuksum, hettutroyggju og inniskóm líkist Rani Petersen meira einum miðalhampa føroyskum unglinga enn einari altjóða poppstjørnu. Eyðkenda purluta hárið avdúkar tó, at Rani eisini er TikTok-fyribrigdið Reiley.

– Eg plagi at fara í kepp, um eg ikki vil kennast aftur, tí tað eru rættiliga fá, ið kenna meg aftur, um tey ikki síggja hárið, sigur Rani Petersen brosandi, meðan hann bjóðar inn í dreingjakamarið heima hjá foreldrunum.

Rani Petersen, sum býr í London, er heima í Føroyum eina løtu og slappar av, meðan hann fyrireikar seg til at fara út at hertaka altjóða poppheimin. Tað er í øllum førum ætlanin. >



GJØGNUMBROT BURTUR ÚR ONGUM

Flestu føroyingar kenna óivað TikTok-videobrotini, har Rani Petersen í leiklutinum sum sítt annað ego Reiley stendur við einari mikrofon og syngur kendar poppsangir framman fyri pastelllittum dúkum.

Øll myndatólini, lampurnar og teir eyðkendu dúkarnir, sum eru keyptir í 2×3 á Hálsi í Havn, avdúka, at tað er her í kamarinum, at Rani skapti Reiley, sum í løtuni hevur 10,8 milliónir fylgjarar á sosiala miðlinum TikTok og hevur sungið seg til ein plátusáttmála við heimskenda plátufelagið Atlantic Records.

– Eg vil gjarna vera the poster child (fortalari, blaðm.) fyri, at tað ber til at fáa eitt altjóða gjøgnumbrot burtur úr ongum úr einum kjallarakamari her í Havn, sigur Rani Petersen brosandi, meðan hann skeinkir kaffi og sessast.

– Tað faktum, at eg havi dugað at tikið mínar egnu myndir og gjørt míni egnu videobrot í hesum kamarinum, er beinleiðis orsøkin til, at eg eri komin so langt, sum eg eri, ásannar Rani Petersen ærliga, meðan hann hyggur út í rúmið, her hann hevur brúkt hundraðtals tímar til at framleiða eyðkendu videobrotini.

– Eg fekk mítt fyrsta myndatól, tá ið eg var 12 ár, og eg havi altíð havt áhuga fyri miðlum og tøkni, myndatólum, ljósi, ljóði, video og framleiðslu. Tað var mín fyrsti kærleiki, greiðir Rani Petersen frá, áðrenn hann brádliga fer á føtur aftur og eftir telduni. >

ULLVØRUHÚSIÐ

Tórshavn's most charming design shop.

Knitwear by Faroese Fashion Brands: Shisa Brand and Steinum.

While on board, learn more about Faroese wool, sheep and knitting in the film 'The Wool Islands', featuring our shop and brands.

Niels Finsensgøta 27
Tórshavn
IG / FB: ullvoruhusid
ullvoruhusid.com

SEATRAVEL

Exclusive boat tours
Sightseeing & fishing

Book your tour all year round

seatravel@seatravel.fo
+(298) 794100

Special offer
Use the code ATLANTIC* and get a 20% discount.
Book now on
seatravel.fo

*Valid until May 1st 2023

– Tað er ótrúligt, hvat tú kanst skapa við hesari tøknini, sigur Rani eldugaður, meðan hann á telduni vísir dømi um nýggjastu 3D-tøknina, sum hann er í holt við at læra seg at brúka.

– Við einum sonevndum greenscreen – hóast mær dámar besta at brúka grátt til endamálið – so kanst tú skapa visuelt spennandi musikkvideo, uttan at tað er neyðugt at byggja dýrar pallmyndir.

RANI OG REILEY

Tú skalt ikki vera serliga leingi í sama rúmi sum Rani Petersen fyri at uppdaga, at her er talan um ein sera gløggan og ágrýtnan ungan mann, ið hevur grundað nógv um seg sjálvan og sína egnu tilveru.

– Rani og Reiley eru fyri mær tveir ymiskir persónar. Rani er droymarin, ið hevur gingið í sínari egnu boblu her í Føroyum og kanska verið eitt sindur innibrendur av at koma úr einum so lítlum og fjarskotnum landi sum Føroyum, tí hann kennir, at tað hevur avmarkað hansara møguleikar. Reiley er hinvegin superoptimisturin, ið trýr yvirdrivið nógv upp á sjálvan, og sum vil gera alt fyri at koma fram no matter the cost, hugleiðir Rani, tá ið hann hevur lagt telduna frá sær aftur.

Tað hoyrist eisini alt fyri eitt á Rana Petersen, at hann hevur búð nógv ár í London. Minst eitt orð ella bæði tvey í hvørjum setningi eru ensk, og hóast tað er eitt rák, sum er upp í tíðini millum ung, so er tað í Ranasa føri eisini eitt tilvitað val.

– I just wanted to blend in, staðfestir hann næstan umberandi og vísir til, at hann ikki líkjast frá. – Um tú skalt tosa við umboðsfólk og umboð fyri plátufeløg og selja teg sjálvan, so skulu hesi fólkini keypa tína sølutalu, og tað er ikki serliga stórur møguleiki fyri tí, um tú ikki dugir at málbera teg væl á enskum. Alt í altjóða tónleikaídnaðinum stendur og fellur við tínum evnum at samskifta tínar dreymar og ætlanir.

> *„Rani og Reiley eru fyri mær tveir ymiskir persónar.“*

SÆDD YVIR EINA MILLIARD FERÐIR

Sosiali miðilin TikTok gjørdist lokomotivið hjá tí innibrenda Rana Petersen at gera stóru dreymarnar hjá tí vónríka Reiley til veruleika. Rani var skjótur út á nýggja pallin, ein sokallaður first mover, tá ið TikTok bleiv sjósett í september 2016.

Sambært Rana sjálvum var hann ein av teimum fyrstu, ið framførdu tónleik á TikTok, og hann kom rættiliga skjótt upp á 10 milliónir fylgjarar á sosiala miðlinum. Higartil eru videobrotini hjá Reiley víst meira enn eina milliard ferðir á øllum teimum ymisku sosialu miðlunum.

– Serliga í fyrstani var TikTok rættiliga vilt, tí tá kundi eg fáa 45 milliónir views (vísingar, blaðm.) fyri eitt nokk so tilvildarligt 12 sekund video av mær. Tað var rættiliga vanligt, at video hjá mær fingu meira enn 10 milliónir views. Nú er TikTok-platformurin meira stabilur, og tað er meira crowded (ovfylt, blaðm.). Hóast fleiri fólk eisini brúka TikTok, so eru tað bara færri views til øll tey, ið nú leggja út á platformin.

EINKI AVRIKAÐ ENN

Rani Petersen ivast í, um hann var komin so langt sum at tryggja sær ein plátusáttmála við eitt av heimsins kendastu plátufeløgum, Atlantic Records, um hann var komin á TikTok tvey ár seinni, enn hann gjørdi. >

– Don't get me wrong. I haven't achieved anything yet, staðfestir Rani, ið merkir, at hann sjálvur heldur seg einki hava avrikað enn. – Men allir teir møguleikar, ið eg havi fingið, eru komnir gjøgnum sosialu miðlarnar. Eg havi arbeitt ordiliga hart og verið ordiliga snildur, men so kann eg heldur ikki taka størri heiður fyri tað. Tað var eisini hepni, at tað riggaði so væl, og míni TikTok-video fingu so nógv awareness (viðurkenning, blaðm.).

Øll, sum eru á sosialu miðlunum, vita, at tað eisini fylgir nógv óhumska við sosialu miðlunum, tí fólk hava eina meining um alt og øll, og tey óttast heldur ikki fyri at gera vart við hana. Rani Petersen hevur í leiklutinum sum Reiley sanniliga eisini fingið nógv oman yvir seg.

– Eg klári ikki at lata vera við at lesa viðmerkingar, sum míni video fáa, hóast fólk siga við meg, at eg ikki skal, greiðir Rani Petersen læandi frá.

GREIÐ VISJÓN ER LYKILIN

TikTok prógvaði fyri plátufeløgunum, at Rani Petersen kundi røkka út til eina stóra altjóða áhoyrarafjøld sum Reiley, so tað gloppaði dyrnar inn til tónleikaídnaðin. Men tað skal meira til enn tað, staðfestir Rani.

– Tað er eisini umráðandi at hava sínar egnu sangir klárar, tá ið plátufeløgini byrja at banka upp á dyrnar, so tú ikki bara verður sæddur sum ein, ið syngur covers (sangir hjá øðrum, blaðm.) á TikTok. Eg var klárur, tí umboðsmaðurin hjá mær í London syrgdi beinanvegin fyri at senda meg á songwriting sessions í London (sangskrivarafundir, blaðm.), tá ið vit fóru undir at samstarva.

Sambært Rana Petersen er tað eisini umráðandi at hava eina greiða ætlan fyri, hvat tú ætlar tær sum tónlistafólk.

– Plátufeløgini fara fyrst og fremst eftir tølum, men aftan á tað er tað tín egna visjón fyri, hvat tú ætlar tær, ið er avgerandi fyri at fáa teg tað síðsta fetið inn í hitan. Eg hevði ikki fingið ein plátusáttmála, um eg ikki hevði ein sterkan listarligan samleika og visti, hvat eg gjørdi og vildi og hví. Men í síðsta enda skalt tú sjálvandi gera góðan tónleik, tað sigur seg sjálvt.

EINKI GARANTI

Atlantic Records, sum er eitt undirfelag hjá Warner Music, beit á. Í síni tíð var tað plátufelagið hjá ABBA, Arethu Franklin, Bee Gees og Led Zeppelin. Og nú er føroyski Reiley at finna millum heimskend nøvn sum Ed Sheeran, Cardi B, Sia, Kelly Clarkson, Lil Uzi Vert og onnur á yvirlitinum yvir tónlistafólk, ið hava sáttmála við Atlantic Records.

– Tað finst einki garanti í tónleikavinnuni, er Rani Petersen skjótur at staðfesta, tá ið prátið kemur inn á plátusáttmálan við Atlantic Records.

– Einans 0,0001 prosent av øllum, sum skriva og spæla tónleik, fáa plátusáttmála við eitt major label (stórt plátufelag, blaðm.). Eitt nú skrivar Atlantic Records bara sáttmála við umleið 20 tónlistafólk um árið, so longu har er tað trupult at sleppa upp um gáttina. Men einans 0,1 prosent av øllum teimum tónlistafólkum, ið fáa sáttmála við eitt major label, blíva heimskend, og tað er altíð møguleiki fyri, at plátusáttmálin verður strikaður.

„At framføra live fyri fólki er nýtt fyri mær, so eg var øgiliga nervøsur.“

Hóast plátusáttmálin við Atlantic Records ikki er nakað garanti fyri, at Rani Petersen fær eitt altjóða gjøgnumbrot sum poppstjørnan Reiley, so ber illa til at siga annað, enn at Rani Petersen er í góðum hondum hjá Atlantic Records. Pete Ganbarg, sum er stjóri fyri talentmenningini í Atlantic Records, tí sum nevnist A&R (artist and repertoire), tekur sær sjálvur av menningini hjá Reiley.

– Pete Ganbarg hevur arbeitt saman við Justin Bieber, Mariah Carey, Santana, Kelly Clarkson, Donnu Summer og øðrum, og hann hevur vunnið fleiri Grammys, so sjálvandi er tað feitt, tí hann kennir øll í bransjuni. Men tað garanterar heldur einki, tí plátufeløg kunnu bara hjálpa, vegleiða og gloppa dyr, men tey skapa ikki tónlistafólk. Tað má koma frá tær sjálvum, staðfestir Rani Petersen.

TOPPTUNAÐ POPPMASKINA

Í fjørsummar var Reiley eitt av høvuðsnøvnunum á Voxbotn tónleikatiltakinum í Havn, og tað var fyrstu ferð, at Rani framførdi sín tónleik framman fyri einari áhoyrarafjøld. Framførslan gjørdist eitt vendipunkt hjá Rana, ið higartil hevur kunnað stýrt øllum bæði framman fyri og aftan fyri linsuna.

– At framføra live fyri fólki er nýtt fyri mær, so eg var øgiliga nervøsur. Øll søgdu, at tað fór at vera amazing (fantastiskt, blaðm.), men eg hugsaði: ‚Hvat geri eg, um mær ikki dámar at spæla live?‘ Eg eri ein kontrollfreak, og eg stríðist enn við at tora at sleppa tamarhaldinum, tí tað er nakað, ið liggur øgiliga djúpt í mær. Men Voxbotn gjørdist ein revelation (opinbering, blaðm.) fyri meg, tí tað var so feitt at síggja, at fólk vóru ordiliga við upp á tað.

Tamarhaldið varð tó ikki slept meira enn so, at framførslan var neyvt løgd til rættis niður í minsta smálut. Rani Petersen er partur av einari topptjúnari poppmaskinu í Atlantic Records, har minst møguligt verður latið upp til tilvildina.

– Eg arbeiði saman við einum musical director (tónleikastjóri, blaðm.), sum miksar liveshowið hjá mær frá byrjan til endan. Ofta verður farið eftir einari live-kenslu í framleiðsluni av liveshowinum, tað vil siga at onkustaðni hoyrir tú áhoyrarar, og so verða kór arrangerað og alt sovorðið. Tað er eitt toppprofessionelt set-up, og tað er øgiliga dýrt, tí fólkini, ið eg arbeiði saman við, arbeiða eisini saman við heimsstjørnum sum Dua Lipa og Lill Nas X. Men tá ið liveshowið er miksað, so er tað gjørt, og til næstu framførslurnar fái eg allan vinningin av tí.

RANI JAGSTRAR EITT HITT

Rani Petersen er skjótur at prika hol á ímyndina av, at tú verður múgvandi av at fáa ein plátusáttmála við eitt stórt altjóða plátufelag. Hóast plátufelagið borgar fyri øllum, so eru pengarnir ikki olmussa, staðfestir Rani Petersen.

– Teir pengarnir, ið plátufelagið gevur mær at brúka til at skapa tónleik, framleiða musikkvideo og at marknaðarføra mín tónleik við, skulu spæla innaftur, áðrenn eg tjeni eina krónur. Og alt kostar nógvar pengar, og eg meini alt. Ein toppprofessionel musikkvideo kostar tvær milliónir krónur at framleiða, so tað sigur ikki so lítið um, hvussu stórar upphæddir eru í spæl.

Næsta fetið hjá Rana Petersen fram ímóti at hertaka altjóða poppheimin er, at hann skal skriva og geva ein sang út, ið verður eitt hitt. Men tað er lættari sagt enn gjørt.

– There is no formula (tað finst eingin uppskrift, blaðm.). ‚*Let it ring*‘-singlan hjá mær var ein góð byrjan. Sangurin hittaði í Suðurkorea, men hann hertók ikki heimin, sum er málið hjá mær, staðfestir Rani Petersen uttan at blunka.

KANST IKKI RENNA AFTANÁ

Beint nú er ‚*Let it ring*‘ spældur fýra milliónir ferðir á stroymingtænastuni Spotify. Rani Petersen greiðir frá, at í altjóða poppídnaðinum skal ein sangur hava 200–300 milliónir spælingar á Spotify, fyri at sangurin verður viðurkendur sum eitt hitt. Men um ein sangur kemur upp á topp 10-listan hjá Billboard í USA, ja, sjálvt topp 20-listan, so er sangurin eitt risahitt, og tað er hagar upp, Reiley ætlar sær.

– Tú kanst ikki stýra, hvør sangur verður eitt hitt. Eg haldi sjálvur, at mín tónleikur er >

„Um tú siktar høgt, so fert tú sjálvandi at raka hægri, enn um tú siktar lágt.“

ordiliga góður, men tað merkir ikki, at onnur fólk halda tað sama. Um tú rennur aftan á tí, sum er populert beint nú, so fert tú altíð at vera aftanfyri, tí tað tekur so langa tíð at geva ein sang út. Sangurin skal fyrst skrivast og framleiðast, eitt musikkvideo og ein marknaðaætlan skal gerast, og so er hálvtannað ár brádliga gingið, áðrenn tín sangur kemur út, og tá eru fólk langt síðani farin víðari, greiðir Rani frá og leggur afturat:

– Tað einasta, ið eg kann gera, er at skriva góðar sangir, arbeiða hart og fylgja mínari egnu intuitión.

HAVA TAÐ OV GOTT Í FØROYUM

Rani Petersen er í ferð við at flyta seg úr sínari comfort zone, sum hann málber seg, og flyta úr London til Los Angeles.

– Eg legði meg frá byrjan eftir at hava ein altjóða samleika á netinum, so tað ikki sást, at eg var úr Føroyum, tí eg fór miðvíst eftir at fáa ein nokk so amerikanskan fjepparaskara. Tað eydnaðist nógv betur enn væntað, og tí passar Los Angeles betur til mín popputa tónlistaprofil enn London. Men nú kenni eg meg heima í London, so tað er eitt sindur trupult at fara frá tí.

Rani Petersen er vísur í, at tað hansara uppvøkstur í Føroyum, ið spælir honum eitt puss.

– Um tú vilt fylgja tínum dreymum, so mást tú taka harðar og tungar avgerðir og gera tað, sum er neyðugt. Trygga tilveran, sum vit njóta her í Føroyum, er eitt tvíeggjað svørð. Vit hava tað so gott, tí her er heilsutrygd, eingin kriminalitetur, og vit eru umgird av familju, og tað ger tað trupult at leypa út í tað ókenda og ótrygga. Oh my God, eg havi so nógv vinfólk í Føroyum, sum brenna so nógv fyri tónleikinum, men hava ilt við at fylgja dreyminum, tí tey hava eitt alt for gott lív her í Føroyum.

Í Ranasa hugaheimi er tað sera einfalt.

– Tú kanst altíð koma aftur til Føroyar, og tú kanst altíð fara í skúla og taka eina útbúgving. Men tú ert bara ungur eina ferð.

HØG MÁL

Áðrenn Rani Petersen fer í holt við at hertaka USA, er málið at byrja við Suðurkorea. Nógvir av hansara trúgvastu fylgjarum og fjepparum á TikTok og øðrum sosialum miðlum eru úr Suðurkorea. Poppmentanin í Suðurkorea tiltalar eisini Rana.

– Suðurkorea er har, ið vit í Vesturheiminum vóru fyri 25 árum síðani, tá ið popptónleikur enn var glamorous (hugtakandi og glæsiligur, blaðm.). Tí vilja fjeppararnir í Suðurkorea framvegis gjarna sleppa at vera partur av. Um okkara leiðir skal popptónleikurin í løtuni vera so øgiliga autentiskur og óglamorøsur og helst gjørdur heima í einum kamari, soleðis sum Billie Eilish hevur gjørt. Mær dámar enn betur glamurin.

Málið hjá Rana Petersen er høgt – sera høgt.

– Vit fáa at síggja, hvussu langt tað røkkur. Um tú siktar høgt, so fert tú sjálvandi at raka hægri, enn um tú siktar lágt, og tað er eitt sindur har, ið eg eri. Eg vil bara sikta so høgt sum yvirhøvur gjørligt, tí eg veit, at tað fer heilt vist at føra meg longst. ■

Høgt til loftið og vítt til veggja

ELEMENTHØLLIN Á SUNDI

Eitt trygt grundarlag

Síðani 2019 hevur Articon framleitt øll sløg- og allar støddir av timbur- og betongelementum innandura. Framleiðslan gongur fyri seg í framkomnu elementhøllini á Sundi.
Tað tryggjar góðskuna, tíðarætlanina og prísstøðið. Og tað skapar tryggleika fyri kundan.

ARTICON

Faroese TikTok Phenomenon **Reiley** on Brink of Global Stardom

Rani Petersen has 10 million followers on TikTok and a record deal with the Atlantic Records. He is on the brink of an international breakthrough as his alter ego Reiley and it all began in his childhood bedroom

In joggers and a hoodie Rani Petersen looks more like your average Faroese youth than the TikTok phenomenon Reiley. 'I wear a cap when I don't want to be recognised,' he laughs. His signature curls always give him away.

The singer has been living in London for some years now. But we get to interview him in his old room at his parents' house, where he is taking a short break before conquering the world.

OUT OF NOWHERE

The cameras and hallmark pastel-coloured sheets reveal that this is where Rani Petersen created Reiley singing pop covers on TikTok. 'I'm very happy to be a poster child for breakthroughs out of nothing, mine happened out of a basement room in Tórshavn,' Rani smiles.

Rani was given his first camera aged 12. Cameras, light, sound and video production were his first passions. Hundreds of hours spent producing photos and videos got him this far. At the moment he is learning how to create 3D effects and using green screens. The results can get very sophisticated without investing thousands.

RANI AND REILEY

Rani Petersen is very hardworking and self-aware. He has reflected deeply on his own life.

He explains that Rani and Reiley are two different people to him. Rani is a dreamer in his own bubble in the Faroe Islands, who perhaps feels a little restricted coming from such a remote place. Reiley, on the other hand, is a super optimist with exaggerated self-confidence, who will do anything to make it 'no matter the cost.'

In London he picked up the music industry jargon, because everything in the business hinges on your ability to pitch your dreams and vision.

OVER A BILLION VIEWS

Rani Petersen seized TikTok as a means to realise Reiley's big dreams. He was one of the first movers when TikTok launched in 2016 and among the first to perform music on the platform.

Reiley soon had 10 million followers and his video clips have over a billion views. 'TikTok was wild at the beginning. I could get 45 million views for a random 12 second video,' Rani recalls.

Now that TikTok is more established it is more crowded. Though there are more users, there is also greater competition for views among content creators.

Rani Petersen doubts whether he would have a record contract now if he had joined TikTok two years later.

– 'Don't get me wrong. I haven't achieved anything yet,' Rani says. But he attributes his opportunities to social media. 'I have worked very hard and been very smart, but can't take more credit than that. It was also luck that my TikTok clips drew so much interest.'

Of course there is a lot of negativity on social media too. 'I can't help reading the comments on my videos, though people tell me I shouldn't,' Rani laughs.

CLEAR VISION IS KEY

TikTok proved to the record companies that Rani Petersen can reach an international audience as Reiley, it opened a door. But it will take more than that.

Rani's agent in London immediately sent him to songwriting sessions in London, so he could be ready with his own songs to demonstrate that he was about more than covers.

And artists need a clear vision. 'I wouldn't have gotten a record deal without a strong artistic identity, without knowing what I was doing and wanting and why,' Rani emphasises.

NO GUARANTEE

Atlantic Records, which is part of the Warner Music groups, is no small label. It boasts names such as ABBA and Bee Gees. And Riley is now in the company of Ed Sheeran, Sia and Kelly Clarkson.

Still, Rani is quick to point out that there is never a guarantee. Only 0.0001 per cent of music makers get a deal with a major label. And of those only 0.1 per cent become world famous. There is always the risk that a deal is cancelled. >

Even so, Rani is in very good hands. Music executive Pete Ganbarg himself is guiding Reiley and he has worked with the likes of Justin Bieber, Mariah Carey and Santana. Ultimately, though, record companies can give guidance and support, 'but creating the artist has to come from within,' Rani says.

"I have worked very hard and been very smart, but can't take more credit than that."

FINE-TUNED POP MACHINE

Reiley headlined this summer's Voxbotn festival in Tórshavn. It was his first live performance of his own music. He calls it a 'revelation' to engage with the audience, though it is hard to let go of the control you have when you produce a video. Still, pop performances are planned to the tiniest detail and Atlantic Record leaves nothing to chance.

Rani works with a musical director who mixes the whole live show. They often go for a 'live-feeling', meaning for example that you hear the audience singing the choirs. This professional setup is very expensive. Reiley's crew also works with Dua Lipa and Lill Nas X. But once a live show is mixed it is done and ready for the next performance too.

CHASING A HIT

Rani Petersen quickly debunks the myth that a record deal makes you rich. Any money he receives to create and market his music has to be earned back, before he earns a penny.

His next step is to write and release a hit. But that is easier said than done. 'There is no formula,' he explains. He calls his single *'Let it ring'* a good start. It was a hit in South Korea and has four million plays on the streaming service Spotify, but Rani wants to conquer the world. It takes 200 to 300 million plays on Spotify to be recognised as a global hit.

It is impossible to control, which song becomes a hit. And for Rani there is no point in chasing what is popular right now as it takes about a year and a half to create and release a song. He concludes that he just has to write good music, work hard and follow his intuition.

LIFE IS TOO GOOD IN THE FAROE ISLANDS

Rani Petersen is in the process of moving from London to LA. He has a lot of fans in the US and LA is a better fit with his pop music profile. But he is comfortable in London, so it is a little tough. Rani Petersen is convinced that it is his Faroese childhood getting in the way. 'If you want to follow your dreams, you have to make tough decisions and do what it takes. Our safe existence in the Faroe Islands is a double-edged sword. Life is so good with healthcare, no crime and family all around – that makes it hard to leap into the unknown.'

But for Rani the choice is clear, 'You can always return to the Faroe Islands, always get an education. But you're only young once.'

Rani Petersen is bold, 'I just want to aim as high as possible, because I know that is what will take me the furthest.' ■





THE STORY OF FAROESE WOOL AND CLOTHING

OPENING HOURS
1 October - 30 April
Thursday - Sunday from
1 pm - 5 pm

ADMISSION FEES
Children 0-16 years **FREE**
Adults **60 DKK**
Seniors **30 DKK**

tjodsavnid.fo

TJÓÐSAVNIÐ
FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM
NATURE AND CULTURE

OUR REGION OF EXPERTISE

AUDITING ACCOUNTING TAX ADVISORY

In order to foresee the future you must know the past.

SENDISTOVAN

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO